FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvsølan

**155 bátar seldu stívliga 127 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Av hesum vórðu 55 tons landað í Klaksvík, 48 tons á Toftum, 19 tons vóru í Vági meðan góð fimm tons vóru í Sørvági. Søla um telefonuppboðssøluna hjá Fiskamarknaðinum er ikki íroknað tølunum niðanfyri**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | Sirið | lína | 147 |
| FD 79 | Havørnin | lína | 306 |
| FD 136 | Lilja | lína | 757 |
| FD 199 | Real | lína | 308 |
| FD 205 | Greta | lína | 3.704 |
| FD 219 | Sjósøki | snella | 250 |
| FD 222 | Gamli Edvard | lína | 1.801 |
| FD 256 | Aðnasker | snella | 179 |
| FD 310 | Sjóberin | lína | 292 |
| FD 322 | Klettur | lína | 465 |
| FD 329 | Karin 3 | lína | 424 |
| FD 33 | Krabbin | lína | 370 |
| FD 361 | Súlan | lína | 1.769 |
| FD 363 | Líðarbrúgv | snella | 412 |
| FD 380 | Amanda | snella | 296 |
| FD 386 | Slættiklettur | lína | 491 |
| FD 428 | Margit J | lína | 174 |
| FD 443 | Tóra H | lína | 193 |
| FD 460 | Safir | lína | 1.499 |
| FD 472 | Støðin | lína | 624 |
| FD 477 | Norðkapp | lína | 245 |
| FD 608 | Lambanes | lína | 177 |
| FD 67 | Huldusteinur | lína | 825 |
| FD 68 | Royndin fríða | lína | 2.773 |
| FD 775 | Langanes | lína | 763 |
| FD 783 | Glúpur | lína | 1.934 |
| FD 818 | Perlan | snella | 83 |
| FD 825 | Einar á Brúnni | lína | 1.870 |
| FD 905 | Trúgvi | lína | 2.033 |
| FD 954 | Vørðan | snella | 616 |
| FD1054 | Aldubáran | lína | 150 |
| FD1067 | Árnasteinur | lína | 225 |
| FD1098 | Bylgjan | snella | 143 |
| FD1148 | Hellisberg | lína | 2.156 |
| KG 123 | Háenni | lína | 3.422 |
| KG 125 | Bjarnaberg | lína | 736 |
| KG 127 | Skurðaklettur | lína | 4.081 |
| KG 143 | Kallanes | snella | 48 |
| KG 146 | Amos | snella | 50 |
| KG 193 | Fliðan | lína | 228 |
| KG 276 | Skorhamar | lína | 809 |
| KG 284 | Hellisendi | lína | 1.313 |
| KG 288 | Heltnin | lína | 1.236 |
| KG 303 | Gerd | lína | 416 |
| KG 334 | Norðan | lína | 1.671 |
| KG 355 | Fløttur | snella | 23 |
| KG 423 | Jaspissteinur | lína | 180 |
| KG 430 | Báran | lína | 582 |
| KG 47 | Havsbrún | lína | 2.446 |
| KG 498 | Zelotes | lína | 570 |
| KG 507 | Søkin | lína | 2.608 |
| KG 512 | Neshamar | lína | 320 |
| KG 587 | Reynsmúli | lína | 4.851 |
| KG 63 | Pollur | lína | 778 |
| KG 640 | Hansa | snella | 258 |
| KG 642 | Bragd | lína | 8.239 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| KG 681 | Nestindur | lína | 1.072 |
| KG 705 | Sonja | lína | 223 |
| KG 706 | Skýlisklettur | lína | 1.923 |
| KG 708 | Vársól | lína | 63 |
| KG 74 | Nestangi | lína | 895 |
| KG 743 | Elsa | lína | 786 |
| KG 744 | Osla | lína | 6.444 |
| KG 79 | Nevið reyða | lína | 3.198 |
| KG 832 | Borgin | lína | 518 |
| KG 94 | Brid Ford | lína | 621 |
| TG 10 | Evi | snella | 82 |
| TG 14 | Heykur | snella | 288 |
| TG 147 | Havrenningur | snella | 797 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 446 |
| TG 185 | Egil | snella | 256 |
| TG 22 | Havgásin | snella | 184 |
| TG 250 | Tvey systkin | snella | 81 |
| TG 26 | Majbritt | snella | 146 |
| TG 283 | Herdis | snella | 703 |
| TG 303 | Richard í Smiðjuni | snella | 433 |
| TG 310 | Sjóriddarin | snella | 684 |
| TG 339 | Báran | snella | 145 |
| TG 349 | Trý drangur | snella | 488 |
| TG 370 | Knávi | snella | 445 |
| TG 395 | Vima B | snella | 76 |
| TG 41 | Vesturskin | snella | 455 |
| TG 435 | Jórun | snella | 338 |
| TG 471 | Núpur | lína | 731 |
| TG 487 | Topas | snella | 156 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 616 |
| TG 523 | Sóley | snella | 1.874 |
| TG 56 | Marian M. | snella | 278 |
| TG 562 | Todnes | snella | 199 |
| TG 576 | Svanur | kalvalína | 401 |
| TG 579 | Eileen | snella | 132 |
| TG 592 | Jenny B | snella | 116 |
| TG 608 | Aldubáran | snella | 52 |
| TG 609 | Ráaklettur | snella | 394 |
| TG 622 | Varðin | snella | 1.195 |
| TG 628 | Alis T | lína | 1.165 |
| TG 631 | Skarstein | snella | 960 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 596 |
| TG 781 | Snæbjørn | snella | 213 |
| TG 787 | Mai v/H. Joensen | snella | 75 |
| TG 802 | Brattanes | snella | 269 |
| TG 808 | Poul S. | snella | 245 |
| TG 91 | Stjørnan | snella | 629 |
| TG 95 | Fløtunes | snella | 1.059 |
| TN 105 | Likkan | lína | 181 |
| TN 157 | Solo | snella | 253 |
| TN 224 | Anrana | snella | 106 |
| TN 23 | Espingur | lína | 586 |
| TN 270 | Torgun | snella | 165 |
| TN 329 | Neptun | lína | 316 |
| TN 358 | Viðarnes | snella | 364 |
| TN 390 | Trý systkin | lína | 2.184 |
| TN 417 | Gunbjartur | snella | 124 |
| TN 483 | Ægir | lína | 8.347 |
| TN 603 | Freyr | snella | 123 |
| TN 707 | Flundran | snella | 155 |
| TN 708 | Selvíkin | snella | 191 |
| TN 718 | Hvítaberg | lína | 1.964 |
| TN 723 | Brattaskorð | lína | 1.456 |
| TN 728 | Pandy | lína | 1.722 |
| TN 753 | Tóra | lína | 1.358 |
| TN 844 | Brandur | snella | 474 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 223 |
| TN 91 | Lómur | snella | 63 |
| TN1018 | Valkyrie | snella | 116 |
| TN1090 | Annika | lína | 2.187 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| VA | Heiðabáturin | snella | 45 |
| VA 105 | Barið | snella | 246 |
| VA 109 | Ella | lína | 839 |
| VA 143 | Thurid | lína | 41 |
| VA 17 | Semina | kalvalína | 67 |
| VA 190 | Sjóberið | lína | 405 |
| VA 221 | Carina | lína | 624 |
| VA 264 | Skarvur | snella | 1.034 |
| VA 269 | Anna Maria m/b | snella | 223 |
| VA 275 | Áardánjal | snella | 258 |
| VA 294 | Nestangi | lína | 317 |
| VA 3 | Kelvin | snella | 205 |
| VA 34 | Dunga Hans m/b | lína | 348 |
| VA 60 | Dáva Dánjal | kalvalína | 129 |
| VA 66 | Gunnvá | lína | 82 |
| VA 75 | Fossur | snella | 176 |
| VA 82 | Raðnes | lína | 392 |
| VN 125 | Ægir | snella | 263 |
| VN 132 | Tordis m/b | snella | 181 |
| VN 156 | Hanus á Bø | snella | 45 |
| VN 168 | Vitin | snella | 263 |
| VN 25 | Toftafossur | lína | 1.296 |
| VN 267 | Jenny m/b | snella | 72 |
| VN 301 | Nósin | snella | 135 |
| VN 303 | Skálhamar | snella | 76 |
| VN 425 | Halla | snella | 87 |
| VN 476 | Hildibjartur | snella | 110 |
| VN 513 | Klettur | snella | 253 |
| VN 520 | Hvannadalur | snella | 103 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 0 | 71 |
| Brosma 3&4 | 63 |
| Hýsa 1 | 18.083 |
| Hýsa 2 | 16.002 |
| Hýsa 3 | 9.716 |
| Hýsa 3&4 | 6 |
| Hýsa 4 | 8.011 |
| Hýsa 5 | 126 |
| Havtaska 0 | 235 |
| Hvítingur 0 | 15.172 |
| Kalvi 1 | 165 |
| Kalvi 2 | 253 |
| Kalvi 3 | 26 |
| Kalvi 4 | 20 |
| Kalvi 5 | 9 |
| Kongafiskur 0 | 111 |
| Longa 0 | 66 |
| Longa 1 | 7 |
| Longa 2 | 9 |
| Longa 3&4 | 3 |
| Longa 4&5 | 3 |
| Reyðsprøka 0 | 32 |
| Skrubba | 40 |
| Steinbítur | 141 |
| Toskur 1 | 410 |
| Toskur 2 | 7.764 |
| Toskur 3 | 23.565 |
| Toskur 4 | 15.793 |
| Toskur 5 | 8.863 |
| Upsi 0 | 1.870 |
| Upsi 1 | 11 |
| Upsi 2 | 212 |
| Upsi 3 | 424 |
| Upsi 4 | 155 |

# Línubátarnir fáa fisk

Línubátarnir hava fingið fisk seinastu tíðina. Línubátarnir royna serliga vestanfyri hesa tíðina, vestur úr Mykinesi og teir hava borið við fisk.

Streymurin er eisini góður nú, hann var bestur 1. juli og harðnar aftur í vikuskiftinum.

Línubátarnir Varðin og Polarstjørnan seldu í gjár ávikavist 16.000 og 20.000 pund av á uppboðssøluni. Fleiri bátar koma inn at landa hósdagin og fríggjadagin.

**je**

# Landleiðin

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Teir 13 trolbátarnir, sum royna á landleiðini, hava hampuligan fiskiskap, men tað hevur ongantíð verið nakað rok, síðan bátarnir byrjaðu fyrst í juni. Tað hevur eisini verið eitt sindur trupult hjá bátunum at halda seg undir tey 35 prosentini av toski, sum kravt verður. Men á hesum økinum er ikki so illa statt sum í fjør, tá bátar máttu gevast at fiska, tí so nógvur toskur var upp í veiðuni.

Bátarnir fáa serliga tungu og reyðsprøku og prísurin hevur ligið millum 16-20 krónur fyri kiloið. Í ár hevur toskurin verið dýrari enn tungan, toskurin hevur fyri tað mesta ligið oman fyri 20 krónur fyri størri fisk.

Bátarnir royna fyri tað mesta á tunguleiðunum eystanfyri. Teir hava eisini roynt í einum kassa, sum er opin á Norðhavinum, men har hevur einki verið at fingið í ár. Seinni, so letir ein góð leið upp norður úr Vágoynni og eisini vestanfyri.

Talan hevur ikki verið um nakað rok í ár, men bátarnir hava ligið millum 12-20 kassar í hálinum. Í einum kassa eru 45 kilo.



Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur 2001:

# Jazzfestivalurin fer í Norðurlandahúsið í kvøld



*Ole Kock Hansen og Niels Henning Ørsted-Pedersen*

JAZZFESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

– Vælkomin til jazzin i Norðurlandahúsinum. Soleiðis fer at ljóða í hátalarunum í kvøld, 4. juli. Og okkurt hæddarpunkt á Jazzfestivalinum 2001, er eisini sett at vera í Norðurlandahúsinum. Har fer Niels Henning Ørsted-Pedersen, NHØP, nevniliga at sýna síni kynstur á bassinum frá klokkan hálvgum átta til níggju. Og stórvegis longur sleppa vit ikki í jazzdygd á hesari klótu.

Men mikukvøldið í Norðurlandahúsinum livir Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur av sonnum upp til navnið. NHØP spælir sofistikerað, bæði jazz og siðvandan norðurlendskan tónleik. Onnur spæla standardjazz, og uppaftur onnur taka sær av tí gittarbaseraða fólka- og blueskenda. T.d. KK. So, kom innum......

## Ein av heimsins bestu

Tað er Niels Henning Ørsted-Pedersen. NHØP spælir bert eina konsert á hesum sinni, og tí má hann spæla í Norðurlandahúsinum. Har er vónandi rúm fyri nógvu okkara, sum síggja upp til danska bassundrið.

Saman við Niels Henning er Ole Kock Hansen. Hann er klaverspælari, og sera navnframur í Danmark sum tónleikari, tónasmiður, og leiðari fyri Danmarks Radio Big Band.

Framførslan hjá NHØP og Ole Kock Hansen kann væntast at vera blandað. NHØP spælir vanliga jazz og norðurlendskan tónleik. Til tíðir er hesið latin í NHØPsa jazzbassham, meðani onnur arrangement eru rættiliga upprunakend. Tó mugu vit ikki gloyma, at Niels Henning Ørsted-Pedersen eisini hevur sítt egna tónasmíð við í skjáttuni. T.d. løg, sum hann hevur spælt saman við Oscar Peterson o.ø.

Niels Henning Ørsted-Pedersen og Ole Kock Hansen, Konserthøllin kl. 19.30.

## Vaksa appelsinir í Føroyum?

Jens Nørholms Orange Jazz Family; Standarjazzur í energiskum nútíðar hami.

Tey flestu í Jens Nørholms Orange Jazz Family spæla vanliga í tí norðurjútska amtsorkestrinum. Og Orange Jazz bólkurin er júst sum teirra "fría" frítíðarorkestur, har tey rættiliga sleppa at folda seg út.

Tónleikararnir eru dugnaligir og tí er ofta boð eftir teimum. Tað dámar teimum væl. T.d. var ein Orange Jazzari við í tí avbera væl samanspælda bólkinum, Swinging Link, ið tók lut á Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivali í fjør. Haraftrat kann nevnast musikalskt samstarv við Robben Ford, Jesper Thilo, Finn Zigler, Debbie Cameron, Sten Vig, Frank Gambale, og David Garfield.

Jens Nørholms Orange Jazz Family lovar, at hon eigur so nógva spæligleði í sær, at hon kann fáa appelsinir at vaksa – sjálvt í Føroyum.

Jens Nørholms Orange Jazz Family, Konserthøllin kl. 22.30.

## KK/Fleischer/Enqvist/ Pensar

Í Klingruni verður amfipallurin væl mannaður við fólkatónleikarum úr Grønlandi, Álandi og Íslandi.

KK, ella Kristján Krisjánsson, er íslendska umboðið. Vit hava hoyrt hann fyrr á Tórshavnar Jazz-Fólka og Blues Festivali, og hann er sera dugnaligur og undirhaldandi. KK letur sín tónleik í tann ham, har hann fær íblásturin. T.d. hevur hann gjørt fløgu við føroyskum íblástri. Annars pakkar hann nógvar ymsar stílar inn í framførslu sína. T.d. eitt sindur av jazzi og ymsum fólkatónleiki.

Hóast navnið ljóðar fremmant, er Ulf Fleischer grønlendskur fólkatónleikari/vísusangari. Hann kemur higar við gittarinum og røddini at bera okkum sang við rót í grønlendskum fólkalívi.

Tveir menn úr Álandi koma sum duett. Tað eru sangarin og gittarspælarin, Bengt Enqvist, og gittarspælarin, Kjell Pensar.

Bengt Enqvist umboðar skemtiligar vísur. Men eisini rættiliga klassiskan fólkatónleik, s.s. Taube, Ferlin, Ruben Nilsson. Haraftrat er góður álendskur tónleikur á skránni, sum vit enn ikki kenna í Føroyum. Bengt Enqvist gjørdi fyrri stuttum eina fløgu. Og annars spælir hann nógv alment í Álandi, Finnlandi og Svøríki.

Saman við Enqvist kemur gittarspælarin Kjell Pensar. Hann er 51 ára gamal, og sigur um seg sjálvan, at hann byrjaði at spæla sum ungur drongur. Men ongantíð hevur hann spælt so nógv – og hildið tað var so stuttligt - sum nú. Kjell Pensar spældi gittar á nýggju útgávuni hjá Bengt Enqvist, Sången Om Jorden.

KK, Fleischer, Engqvist, Pensar, Klingran kl. 21.00.

## Aftur til byrjanina

Tiltakið í Norðurlandahúsið mikukvøldið 4. juli, byrjar kl. 19.00. Tá vit lata dyrnar upp møtir okkum tónastreymur frá einum donskum klarinettorkestri, hvørs líka vit tíverri ikki eiga í Føroyum.

Í Broby Klarinet Orkester spæla tey burturav klarinett, og tey eru ikki færri enn 18 í tali, bæði blaðungir og tilkomnir tónleikarar.

Vit tosa her um eitt av teimum orkestrunum, ið vóru sera vanlig á Jazzfestivalinum í 80unum. Tað spælir glaðan jazz, har ætlanin er at fólk kunnu murra við, og annars vera í góðum lag. Broby Klarinett Orkestur fer at leggja botn í kvøldið við spæli í Forhøllini frá kl. 19.00 til 19.30.

VIÐMERKINGAR

# Sjálvstýrisflokkinum so líkt

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum metir, at 300 mill skulu brúkast í íløgum fyri at nøkta tørvin á ellis-og røktarheimun og 100 mill meira um ári til rakstur, og tað skal nokk passa.

Formaðurin sigur víðari, at íløgur hjá teimum gomlu skulu veljast fram um aðrar íløgur.

**Hví er einki gjørt.**
Men hví hevur formaðurin einki gjørt við hetta mál í tey 3,5 árini, hendan samgonga hevur siti? Sjálvstýrisflokkurin hevur 17. mannin, so okkurt kundi verði gjørt, um viljin var tilstaðar.

Tað hevur verði nokk av pengum og eftir formansins uppskotið, kundi verði bygt ellis-og røktarheim fyri 140 mill í hesi 3,5 árini.

- hví er tað ikki gjørt?
- hvar er viljin?
- hvat eru góðorðini hjá samgonguni verd?

og kemur hetta uppskoti bert fram, tí løgtingsval nærkast?

**Hvussu hongur bygging og rakstur av einum sambýli saman.**
Fyri at byggja eitt sambýli kann kommunan fáa stuðul uppá kr. 50.000,- pr. íbúgva á sambýlinum, men hægst kr. 500.000,- og er hetta ivingarsamt, tí pengar eru ikki altíð avsettir á fíggjarætlanini.

Eitt sambýli til 10-12 fólk kostar umleið 5-6 mill at byggja. Kommunan skal útvega 15% av ætlaðu íløguni t.v.s. kr. 750-900.000, restin blívur lánt yvir eitt langt áramál.

Kommunan rindar kr. 700.000-1.000.000 fyri rakstur, alt eftir hvussu nógv búðfólk eru á sambýlinum, harímillum er løn til náttarvagt.

Íbúgvarnir á sambýlinum gjalda fyri at búgva har.

At rósa sær av, at (vit) samgongan hevur útvega 50-60 pláss til eldri fólk á sambýlum, er at fara ógvuliga lætt um sannleikan.

Tað er kommunurnar og pensionistarnir sum gjalda, landi rindar bert omanfyri nevnda stuðul og løn til heimahjálparnar um dagin.

At kommunurnar gera tað, sum landi átti at gjørt, er syrgiligt, menn tíverri satt, og vísir hetta hvussu skeivt býtið er millum land og kommunu í hesum døgum.

Tað er altíð lætt, at taka sær æruna av tí, ið onnur gera.

**Sjálvstýrisflokkurin og Suðuroy.**
Allir suðuroyingar vita, hvat hesin flokkur hevur gjørt fyri suðuroy tey seinastu árini, og er tað ájavnt við null.

Og tað kemur klárt fram, nú formaðurin í flokkinum sigur, at onkur skínandi íløga í stáli ella beton má bíða, at flokkurin ikki hevur broytt støðu, men vil varveita suðuroy sum eina útoyggj.

# Tekn til børn

BÓKAÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út teknmálsbók og fløgu, nevnd Tekn til børn, sum er ætlað børnum, foreldrum, pedagogum og øllum teimum, sum tørva eina bók við grundstøði í teknmáli, tá ið tey skulu hava samskifti við fólk, ið eru tunghoyrd ella eru deyv. men bókina kunnu tey eisini nýta, sum hvønn dag arbeiða saman við fólki, ið onkursvegna skulu brúka tekn.

Heri Jacobsen hevur týtt bókina. Edny Poulsen hevur tillagað fil føroysk tekn og útvegað serføroysk tekn. Serføroyskar tekningar hevur Janus Dam Guttesen teknað.